# 07 Vestur, EB/Streymur, ÍF og B68 í hálvfinaluni

**FÓTBÓLTUR** Í Runavík vann EB/Streymur 3-1, í Fuglafirði vann ÍF 7-1 á AB, í Gøtu endaði tað 2-2 og B68 vann síðani 4-2 eftir brotssparkskapping, og í Sørvági vann 07 Vestur 1-0 á KÍ

Hilmar Jan Hansen

Drúgvasti og mest spennandi dysturin mikukvøldið, tá fjórðingsfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið vóru á skránni, var uttan iva dysturin í Sarpugerði millum Víking og B68, sum bæði mátti út í umdyst og brotssparkskapping, áðrenn greitt var, at B68 kom víðari í hálvfinalurnar.

Finnur Justinussen skallaði annars Víking framum í vanliga dystinum, áðrenn Ibrahima Camara fekk sneitt sær millum nakrar ljósabláar og javnað fyri B68. 1-1 helt sær allar 90 minuttirnar, og tí mátti umdystur spælast í tvær ferðir eitt korter. Ibrahima Camara, ið var serstakliga væl upplagdur mikukvøldið, fekk lagt B68 á odda 2-1, tá seinni hálvleikur í umdystinum var fýra minuttir gamal, og hetta á eisini út til at gerast úrslitið, til Sølvi Vatnhamar í yvirtíðini fekk javnað til 2-2.

Hetta merkti, at dysturin mátti avgerast við brotssparkum, og her vísti tað seg, at B68-málverjin, Tórður Thomsen, skuldi gerast stóra hetjan, tí hann megnaði at bjarga spørkunum frá bæði Kaj Leo í Bartalsstovu og Evrard Blé, samstundis sum toftamenninir annars fingu øll síni í málið, so B68 tí hevur vunnið sær pláss í hálvfinalunum.



TRÍGGJAR FERÐIR BOGI

*Bogi Løkin hjá ÍF, ið her hevur Tummas Justinussen úr AB eftir sær, skoraði trý av teimum sjey málunum hjá fuglfirðingum mikukvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Einki at rafla um

Í Runavík tók NSÍ ímóti EB/Streymi, sum nokk so skjótt vísti seg at hava meira upp á hjarta. Sundalagsmenn fingu spælið at hanga betur saman og vóru yvirhøvur næskari í sínum royndum. Munurin var kanska ikki so stórur fyri steðgin, men beint fyri hálvleik eydnaðist Leif Niclasen at leggja EB/Streym á odda, tá hann í tveimum førum skallaði ímóti málinum.



*Mynd: Álvur Haraldsen*

Málið kom dátt við hjá NSÍ, sum tíðliga í seinna hálvleiki fekk enn ein frammaná, tá Gert Hansen økti til 2-0. Eftir hetta gjørdist tað meira enn trupult hjá heimaliðnum at gera seg galdandi, samstundis sum gestirnir tóktust bara meira og meira væl upplagdir. Krúnuna á verkið setti Hans Pauli Samuelsen, tá hann við góðum skoti skoraði til 3-0, og so var hesin dysturin endaliga avgjørdur.

Hetta merkir, at EB/Streymur fimta árið á rað er í finaluni í kappingini um Løgmanssteypið, har hagtølini eisini hava verið serstakliga góð, tí sundalagsmenn hava vunnið tríggjar av teimum fýra finalunum higartil.

## Dramatiskur endi

Í Sørvági var uppgerð millum tey bæði liðini, sum fluttu upp eftir kappingarárið í fjør, og her skuldi 07 Vestur vísa seg at draga longra stráið ímóti KÍ, sum annars telist millum oddaliðini í landskappingini.

Bara eittans mál kom í hesum dystinum, og tað skoraði Eli Falkvard Nielsen, tá umleið ein hálvur tími var farin. Tór-Ingar Akselsen sendi hornaspark innfyri úr vinstru síðu, og fyri KÍ-málinum var Eli hægstur og fekk við høvdinum stýrt bóltinum inn um Gunnar á Steig og í málið.

Hetta legði størri trýst á KÍ, sum eisini royndi at flyta spælið longur fram á vøllin. Men illa bar til at gera nakað við 07 Vestur, ið tóktist hava sera gott tamarhald á tí, sum hendi á vøllinum. Og kanska var heimaliðið eisini nærri við at økja, enn gestirnir vóru at javna.

Ímóti endanum spurdist nógvur dramatikkur burturúr, tá KÍ-spælarin, Bárður Heinesen, ið var komin inn í seinna hálvleiki, fekk reyða kortið eftir ein samanbrest við málverjan hjá 07 Vestur, Hans Jørgensen. Báðir spælarar máttu á sjúkrahús, og steðgurin var so mikið drúgvur, at nógvir minuttir blivu lagdir aftrat, men tað broytti einki, so 07 Vestur er í hálvfinalunum.

## Málríkt í Fuglafirði

ÍF, sum í fjør tapti steypafinaluna fyri EB/Streymi, hevur enn møguleikan at endurtaka dystin, eins og EB/Streymur sjálvandi hevur tað. Men hóast ÍF á pappírinum hevði lættastu uppgávuna, tí mótstøðuliðið var AB úr næstbestu deildini, bendu fyrstu trý korterini ikki á ein so greiðan og stóran sigur, sum ÍF at enda skuldi vinna.

Hálvleiksstøðan var 1-1, eftir at bæði lið høvdu fingið mál burtur úr hornaspørkum, men í seinna hálvleiki kom av álvara gongd á hjá ÍF, ið trygt koyrdi sær sigurin heim við ikki færri enn seks málum aftrat, so endaliga úrslitið gjørdist 7-1.

So hvørt sum klokkan gekk, øktist munurin bara. Stóri málslúkurin hjá fuglfirðingum mikukvøldið var Bogi Løkin, ið skeyt trý av teimum sjey málunum, og annars hjálpti teir í AB væl til, tí tvey av málunum hjá ÍF vóru sjálvmál.

## Løgmanssteypið

fjórðingsfinalur

**Vík. - B68** 1-1 (0-0)
B68 vann 6-4 eftir umdyst og brotsspørk
1-0: Finnur Justinussen, 71.
1-1: Ibrahima Camara, 82.
1-2: Ibrahima Camara, 108.
2-2: Sølvi Vatnhamar, 120.
Brotssparkskapping:
3-2: Finnur Justinussen
3-3: Andre Olsen
3-4: Jóhan Dávur Højgaard
4-4: Hanus Jacobsen
4-5: Ibrahima Camara
4-6: Óli Olsen

**NSÍ - EB/Str.** 0-3 (0-1)
0-1: Leif Niclasen, 43.
0-2: Gert Hansen, 54.
0-3: Hans Pauli Samuelsen, 73.

**07V - KÍ** 1-0 (1-0)
1-0: Eli Falkvard Nielsen, 29.

**ÍF - AB** 7-1 (1-1)
1-0: Jan Ellingsgaard, 10.
1-1: Teitur Jóanesarson, 31.
2-1: Bogi Løkn, 51.
3-1: sjálvmál, 59.
4-1: Bogi Løkin, 67.
5-1: Bárður á Lakjuni, 77.
6-1: Bogi Løkin, 80.
7-1: sjálvmál, 86.



VÁGAMENN DRÚGVARI

*Við einum málið eftir hornaspark, sendi 07 Vestur Høgna Madsen og KÍ úr steypakappingini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*